*Jarðfrøðingar í Føroyum og kring alt Europa:*

# "Hyggja" nú niður í føroyska undirgrund

*Fyri fáum døgum síðani fekk føroyska oljufyrisitingin og fleiri stór og kend oljufeløg ymsa staðni í Europa tær fyrstu viðgjørdu seismisku upptøkurnar, sum Western gjørdi í Føroyum í fjør.*

Sunnudagin kom virðismikil farmur til Føroya við farmaskipi úr Aberdeen. Talan er um fyrstu seismisku upptøkurnar, sum amerikanska felagið Westen gjørdi á føroyskum øki í fjør. Harumframt er talan um eina sera framkomna teldu-arbeiðsstøð, sum verður sett upp á Oljufyrisitingini í næstum viku.

Í løtuni situr Heri Ziska, jarðfrøðingur og roynir at týða og tulka upptøkurnar, sum eru viðgjørdar á høvuðsstøðini hjá Western í London.

Um somu tíð sita jarðfrøðingar ymsa staðni í Europa og týða hetta sama tilfarið. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa upplýst, hvørji og hvussu nógv oljufeløg hava keypt seismiskt tilfar frá Western. Men millum oljufeløgini, sum hava fingið upptøkurnar, eru nýggja samtøkan av trimum oljufeløgum, Statoil, Mobil Oil og Enterprice. Hesi feløgini viðgera tilfarið í hesi løtu. Og millum jarðfrøðingarnar, sum arbeiða við hesum nýggja og spennandi tilfarnum er eisini ein føroyingur. Tað er Petur André Norðgerð úr Lorvík, sum hevur fingið arbeiði hjá Statoil.

Eisini á Danmarks Geologiske Undersøgelser sita teir nú og viðgera tilfarið. Hetta er í samstarvi við føroysku oljufyrisitingina.

jan



*Heri Ziska, jarðfrøðingur á oljufyrisitingini er í ferð við at tulka fyrstu viðgjørdu seismisku upptøkurnar hjá Western. Mynd kalmar*




*Petur André Norðgerð situr í hesum døgum á rannsóknarstovuni hjá Statoil í Danmark og tulkar seismiskar upptøkur úr føroysku undirgrundini. Mynd kalmar*



## Vikan ið fór



Dagny Joensen, blaðkvinna, skrivar:

Í vikuni vóru norðurlandaráðsfundir í Reykjavík, og tað broytti ikki støðuna hjá okkum ella øðrum - annað enn at nýggi bygnaðurin fyri norðurlandasamstarvið varð skotin eitt ár út í framtíðina.

Heldur eingin broyting kom í millum Danmark og Føroyar, og dómarakanning/ serfrøðingakanning stendur á jøvnum. Edmund Joensen, løgmaður, er kendur fyri at vilja bíða, tá trupulleikar stinga seg upp. Tað ger hann kanska rætt í hesaferð.

Vikuskiftið varð einamest brúkt til spæl. Fólk vóru at síggja í fjøllum og aðrastaðni í vøkru kavakløddu náttúruni, ið var sum ein glæstrimynd á at líta. Tað er ivaleyst langt síðani, fólk góvu sær stundir at spæla, og helst vóru nógv, sum høvdu gloymt alt tað tunga og keðiliga, sum dagarnir annars eru á tremur av í hesum døgum. Tú kanst siga, at Várharra gav okkum eitt fríkorter í vikuskiftinum.

Í Danmark savnast fólk úr 130 londum at tosa um sosiala menning fyri øll fólkasløg í heiminum. Seinastu vikurnar hava bløðini verið fylt av gitingum um, hvørjir stjórnarleiðarar mundu fara at leita sær til Keypmannahavnar í hesum ønndum. Eisini aðrir stovnar hava verið tilbúnir at taka móti gestunum í Keypmannahavn í seinastuni. Eitt nú hava skøkjurnar brynjað seg til meiri arbeiði.

Óhugsandi at seta sosiala menning og skøkjulevnað saman, heldur tú? Hvussu eru menn settir saman, tá teir ikki kunnu fara heimanífrá uttan at hava eitt konufólk at krøkja seg í? Tú hugsar, at teir skulu tosa um, hvussu sosiala menningin kann flytast út um øll landamørk, og so verður tað kanska til, hvussu sex kann flytast tvørtur um landamørk. Ein løgin samanbering - men kemur tað øðrum til góðar?

Bill Clinton, forseti í USA, hevur meldað avboð til ráðstevnuna. Tað er eitt sindur hugstoytt, tá júst hesin forsetin hevur sagt seg vilja menna og útbyggja sosialu skipanina í Guds egna landi. Hann hevur fyribils ikki fingið sett sínar ætlanir í verk, men so er hann giftur við Hillery, og hon er kanska tann sterkasta av teimum báðum. Hillery Clinton kemur til Keypmannahavnar, og fer at halda røðu á NGO-ráðstevnuni, sum er tann alternativa til ta almennu ráðstevnuna í Bella Centrinum.